HB-KÍ 2-1 (2-0):

# HB eigur framvegis avgerðina

**Við sigrinum á KÍ syrgdi HB fyri, at teir enn standa einsamallir við FM-avgerðini. Men tað krevur so eisini ein sigur í seinasta umfarinum, tá grannauppgerðin er á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað eydnaðist ikki KÍ at arga HB á sama hátt, sum klaksvíkingarnir annars hava gjørt tað við Skála og B36 seinasta mánaðin ella so.

Klaksvíkingarnir royndu ananrs til tað allar seinasta, og til tíðir kókaði blóðið hjá báðum pørtum yvir. Men tá alt kom til alt, so hevði HB tikið væntaða favoritt-sigurin, soleiðis at teir fram til tað seinasta eru partur av FM-stríðnum. Eitt stríð, sum teir nú kunnu avgera sjálvir, um teir vinna seinasta dystin á árinum.




*Sera nógvir og harðir nærdystir vóru á skránni í Gundadali. Her eru tað Høgni Madsen og Vagnur Mohr Mortensen, sum stríðast um bóltin*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

## Vakurt mál punkteraði dystin

Fyrstu longu løtuna var annars ikki so nógv, sum bendi á, at HB skuldi fáa teir heilt stóru trupulleikarnar á degnum. KÍ byrjaði varisliga á sama hátt, sum teir gjørdu tað móti B36, men tað gekk tó ikki long tíð, áðrenn hol kom á ballónina.

Høgni Madsen klossaði við bóltinum á miðvøllinum, og so gekk tað skjótt fyri seg. Rasmus Nolsøe sendi bóltin inn um tunnu KÍ-verjuna, og hóast gestirnir vildu vera við, at talan var um rangstøðu, so var Uni Arge ísakaldur.

Hetta gav bara HB enn betri fortreytir at spæla, og eina løtu spruttaðu teir nakað. Kanska ikki soleiðis, at talan var um reinan sjampanjufótbólt, men tá teir høvdu møguleika, so gekk tað aloftast skjótt fyri seg. Og einar tvær ferðir dansaði bólturin inni móti málstrikuni, uttan at hetta tó kastaði nakað av sær.

Tað gjørt tað tó á hálva tímanum. KÍ var annars spakuliga um at koma fyri seg, og einar tvær ferðir høvdu teir eisini skapt vandastøður, tá teir við longum sendingum eftir kantinum spældu HB-verjuna tunna. Men hetta varð alt gjørt at kalla fyri ongum.

Jákup á Borg fekk eina langa sending úr vinstra verjuborðið. Sera hegnisliga stýrdi hann bóltinum inn um Eyðun Klakstein í temjingini, áðrenn hann av brotsteigarmarkinum meddaði til móti nærmasta stólpa. Eitt sera vakurt mál, sum á sín hátt eisini undirstrikaði styrkina, sum HB-liðið hevur havt í ár. Tí hóast tað kanska ikki altíð hevur verið so elegant, so hava teir í avgerandi løtunum havt avgerandi spælararnar sum hava skotið avgerandi málini.

## Málið setti ferð á

Tað tóktist leingi, sum hevði seinna HB-málið fullkomuliga punkterað dystin. Klaksvíkingarnir tóktust ikki veruliga trúgva upp á møguleikan at koma aftur í dystin. Og í sínum lag kundu vertirnir taka tað hampuliga róligt. Ikki minst eftir ein fyrra hálvleik, sum til tíðir varð merktur av ljótum spæli, sum dómarin tíverri ikki megnaði at steðga.

Tað líktist eini friðarligari avspáking, men brádliga kom av álvara lív í aftur dystin. KÍ hevði álop í høgru síðu, og tá bólturin varð sendir innfyri, megnaði Bárður Johannesen ikki at halda bóltinum, tá Ovi Nysted leyp í krovið á málverjanum. Heimamenninir vildu hava fríspark, men floytan tagdi, og so kundi Símun Joensen senda returin í netið.

HB'arnir vóru í øðini, og millum annað fekk Bárður sjálvur eitt gult kort, tá hann mótmælti málinum, men hetta stóð kortini við. Og so fingu klaksvíkingarnir av álvara eina vón um, at hetta skuldi bera til. Serstakliga royndu teir við longum bóltum at seta HB-verjuna undir trýst. Rættiligir møguleikar spurdust tó ikki burturúr, men oftani gjørdist talan um innlegg í brotsteigin, soleiðis at spentar støður stóðust av. Og eisini úti á vøllinum gjørdist talan meira enn ta einu ferðina um somikið spentar støður, dómarin ikki heilt megnaði at stýra spælinum.

Heilt galið gjørdist tað móti endanum. Í frustratión um, at dómarin ikki vildi geva KÍ brotsspark, fóru fleiri klaksvíkingar yvir móti svarta manninum, sum at enda eisini gav reytt kort til Ova Nysted fyri áhaldandi mótmæli hansara.

## Eiga enn avgerðina

HB-spælararnir vóru sum so heldur ikki heilt nøgdir, men úrslitið var júst tað, sum teir vildu hava. Enn er liðið partur av FM-stríðnum, og enn kunnu teir avgera hetta sjálvir.

Og tað fingu teir eisini at kenna frá áskoðarunum. Við fagnarrópum markeraðu hesir, at enn eru meistararnir ikki lidnir. Fram til seinasta bóltin ætla teir sær aftur í ár at teljast millum teirra, sum stríðast um gullið, og so er einasti spurningurin, hvørt tað eisini skal eydnast at fáa fjórða av slagnum til høldar. Hóast tað kanska ikki altíð hevur sæð eins vakurt út, so hava teir røkt skylduna higartil. Nú ræður bert um at gera arbeiðið liðugt.

## Fakta um dystin

**HB-KÍ 2-1 (2-0)**
**1-0:** Uni Arge, 11.
**2-0:** Jákup á Borg, 30.
**2-1:** Símun Joensen, 58.
**Dómari:** Dagfinn Olsen. Loyvdi alt ov nógvum grovum frísþørkum fyrstu løtuna, og fekk tí ongan tíð lagt eina greiða linju í dystinum.
**HB:** Bárður Johannesen - Hallur Danielsen, Hans á Lag, Rasmus Nolsøe, Svend F. Jacobsen - Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Vagnur M. Mortensen - Jákup á Borg (Johan Eivind Mouritsen, 78.), Uni Arge (Hendrik Rubeksen, 41.), Rókur Jespersen (Rani Christiansen, 75.)
**GK:** Vagnur M. Mortensen, 30., Jákup á Borg, 39., Bárður Johannesen, 60., Rúni Nolsøe, 65.
**KÍ:** Meinhardt Joensen - Harley Bertholdsen, Jan Andreasen, Niclas Niclasen, Eyðun Klakstein (Leon Bjartalíð, 90.) - Arnhold Joensen (Kristoffur Jacobsen, 75.), Høgni Madsen, Marek Wierzbicki (Ovi Nysted, 55.), Símun Joensen, Heðin á Lakjuni - Hjalgrím Elttør
**GK:** Jan Andreasen, 6., Símun Joensen, 65.
**RK:** Ovi Nysted, 90.

# Ikki nógv gott eftir

**Hallur Danielsen staðfesti eftir dystin móti KÍ, at HB nú veruliga koyrir upp á pumpurnar. Men sum hann sigur, so klára teir nokk eisini at taka eitt seinasta tak afturat á árinum**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*



*Hallur Danielsen helt, at dómarin hevði havt eina øgiliga trupla uppgávu sunnudagin*

Í HB rigga tey seg nú til at spæla FM-finalu móti grannunum úr B36. Fyritreytin fyri hesum var, at dysturin móti KÍ skuldi vinnast. Tað var sum tað einasta, sum hevði týdning hendan dagin, staðfesti HB-veteranurin, Hallur Danielsen.

- Nú er alt sjálvandi púrasta opið undan seinasta dystinum.

Og tað var kanska eisini ein harður dystur?

- Tað varð tað, men tað kundi eisini roknast við. KÍ'arnir skuldu sum so ikki hugsa stórvegis um at spara fólk til næstu uppgávuna, so teir herjaðu á. Og sjálvandi mugu vit svara aftur, so talan verður um ein sera truplan dyst at døma

Men hóast talan var um trupla uppgávu, so helt Hallur, at teir fyri tað nógva høvdu eitt heilt gott tak á.

- Fram til teir skora, haldi eg okkum hava gott tamarhald á, men tá gjørdist talan um dekan ov nógvar nervar hjá okkum. Teir skaptu kanska ikki tað stóra, men teir høvdu fleiri deyðbóltsstøður, sum kundu verði vandamiklar. Ikki minst tá vit samstundis frættu, at Skála hevði skorað, tí tá var kravið til okkum ein sigur.

Men tað hóskaði tykkum kanska væl, at Skála vann sín dyst kortini.

- Nú skal B36 so eisini út at vinna dystin næsta vikuskifti. Tað vildi heilt greitt verið ein enn truplari uppgáva, um teir kundu staðið seg við javnleiki, so í so máta er uppgerðin kanska meira opin.

Men tá tosið fór at snúgva seg um FM-finaluna, tóktist Hallur ikki vilja gera nakrar sum helst staðfestingar her og nú.

- Nú mugu vit fyrst síggja, hvussu vit eru fyri til dystin. Kári er so leikbannaður, men hartil tykist ivamál vera um fleiri spælarar. Uni og Jákup fara báðir út við skaða í dag. Jóhannis er framvegis skaddur, og vit vita ikki, hvussu Janus og Tór-Ingar eru fyri. Og knæið hjá Hans hevur ofta argað, so har eru nógv ivamál.

Men tit klára kanska at svinga tykkum upp til ein seinasta dyst?

- Jú sjálvandi verða vit ellivu á vøllinum, men nú koyrir tað alvorliga upp á tað allar seinasta. Sjálvur rokni eg tó við, at vit allir sum ein klára at taka okkum saman til seinasta dystin. Ikki minst, nú hann verður av hesum slagnum.